

Stjórin í oljufelagnum Shell, Ben van Beurden. Mynd: Shell

# Shell vil eisini hava skotar at siga nei

**Jógvan Hugo Gardar**

18.09.2014 - 20:22

Oljan.fo

Stjórin í oljufelagnum Shell, Ben van Beurden, stuðlar óttanum hjá hinum oljurisanum, BP, og vil hava skotar til at siga nei takk til skotskt sjálvstýri.

- Vit ynskja at Skottland heldur fram at vera ein partur av Bretlandi. Vit hava eina langa søgu sum íleggjari í Skottlandi, og ynskja at halda fram, sigur Ben van Beurden. Hann legði afturat at tað annars ikki er ein spurningur sum Shell hevur nakað við at gera, og at tað er upp til tað skotska fólkið sjálvt at taka eina avgerð um.